Undirvísingarstýrið

+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Føroya Løgting
Fíggjarnevndin
100 Tórshavn

6. apríl 2021

Vísandi til fund í Fíggjarnevnd Løgtingsins, tann 25. mars 2021, skal Undirvísingarstýrið lýsa nærri fíggjarliga partin av heildarætlanini, ið liggur uttanfyri fíggingartørvin á 40 mió. kr., ið biðið verður um í uppskotinum til verklagslóg.

Sum lýst í heildarætlanini **"Saman um eina trygga KT-loysn"**, ið varð handað landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum tann 4. september 2021, og í uppskotinum til verklagslóg, *"Uppskot til Løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið"*, Løgtingsmál 114/2020, so fevnir heildarætlanin um tvey høvuðsátøk:

1. Stovna "Skúlanet", sum er ein felags rakstrar- og supportorganisatión, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar. Skúlanet er ein KT-felagskapur umboðandi Undirvísingarstýrið, Nám, kommunurnar, fólkaskúlan, miðnám, yrkisnám, Fróðskaparsetur Føroya og KT Landsins. Størsti parturin av uppgávunum verður útveittur til føroysku KT-vinnuna.

2. At menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarskipan, sum er felags fyri fólkaskúlar, miðnám, yrkisnám og Fróðskaparsetur Føroya. Lestrarfyrisitingarskipanin veitir talgildað skúlaumsiting, felags lærupallar og tíðarhóskandi talgilt samskifti millum skúla, næming og heim.

Málið er, at Skúlanet og nýggja lestrarfyrisitingarliga kt-skipanin er sett í verk í øllum undirvísingarverkinum í 2025.

Biðið er um 40 mió. kr. í lógaruppskotinum til tess at fremja kt-heildarætlanina. Í serligu viðmerkingunum til § 1 í uppskotinum til løgtingslóg verður sagt, at: *"At "fremja" í hesum samanhangi merkir at menna og verkseta lestrarfyrisitingarkipanina og at verkseta Skúlanet, umframt tann rakstur, ið stendst av menning og verksetan í tíðarskeiðinum 2021-2025."* Við øðrum orðum, so er uppskotið til verklagslóg til at menna og íverkseta eina lestrarfyrisitingarliga kt-skipan, eina fakskipan til skúlaverkið, soleiðis sum umtalað í høvuðsátak 2, og at verkseta Skúlanet.

Høvuðsátak 1, sum er at skipa eitt Skúlanet, er *í felagsskapi* at røkja uppgávur, ið liggja á hvørjum stovni sær í dag, umframt nýggjar uppgávur, ið skulu tryggja, at alt skúlaverkið livir upp til krøv um kt-trygd og vernd av persónsupplýsingum. Til at standa á odda fyri hesum arbeiðinum verður ein kt-eind stovnað í Undirvísingarstýrinum.


Í arbeiðinum við heildarætlanini er mett um fíggingarleistin út frá roknskapartølum í Búskaparskipan Landsins seinastu 3 árini, frá 2017-2019, fyri land og kommunur. Í hesum tíðarskeiðinum hevur landið brúkt í miðal 25 mio. kr. um árið til kt-økið í undirvísingarverkinum. Av hesum eru í miðal 12

mio. kr. um árið í beinleiðis kt-útreiðslum, so sum gjøld fyri loyvir (license), tekniska kt-útgerð, gjøld fyri uttanhýsis tænastur og support, kt-útgerð o.s.fr. Harumframt hevur landið brúkt í miðal 13 mió. kr. um árið í lønarútreiðslum til starvsfólk í undirvísingarverkinum.

Í sama tíðarskeiðið hava allar føroysku kommunurnar í miðal brúkt 5 mió. kr. tilsamans um árið til kt í fólkaskúlunum. Tá eru møguligar nýíløgur í sambandi við bygging av nýggjum skúlum ikki taldar við.

Fyrireikingin av heildarætlanini er higartil fíggjað av felagskontoini fyri miðnámsøkið. Nú kt-eind er skipað í Undirvísingarstýrinum, verður hetta umlagt til undirkonti í Undirvísingarstýrinum, til at fíggja raksturin av kt-eindini, ið hevur ábyrgd at fremja heildarætlanina í verki.

Til tess at fremja "Skúlanet", so verða fleiri av uppgávunum, ið hvør einstakur skúli og útbúgvingarstovnur higartil hevur loyst fyri seg, loystar í felag. T.v.s. at talan í mestan mun er um útreiðslur, sum longu standast av verandi virksemi, sum verða fluttar til felagsskapin at bera.



Partarnir eru KT Landsins, UVS/Nám, skúlar og útbúgvingarstovnar og kommunurnar

Mynd 1

Henda felags loysn ger, at útreiðslur, ið hvør einstakur stovnur higartil hevur borið, nú skal berast av felagsskapinum. Mynd 1 vísir eina prinsipptekning av broytingini. Í dag skal hvør undirvísingarstovnur í grundini taka sær av øllum "kassunum" á mynd 1. Eftir broytingina eru bert teir grønu kassarnir eftir á hvørjum einstøkum útbúgvingarstovni, meðan allar aðrar uppgávur verða loystar í felag.

Mett er, við støði í útreiðslunum hjá landi og kommunum árini 2017-2019, at av útreiðslunum hjá landinum á í miðal 25 mió. kr. um árið, verða útreiðslur, ið felagsskapurin framyvir kemur at bera, mettar til 8 mió. kr. av hesum. Av partinum hjá kommunum varð mett, at umleið helvtin, tað er 2,5 mió. kr. av teimum 5 mió. kr, sum verða brúktar, koma at verða útreiðslur í felagsskapinum framyvir. Heildarætlanin tekur hædd fyri, at samlaði parturin hjá kommununum møguliga kemur at hækka, sí síðu 14 í heildarætlanini. Partvís tí býtið millum einstøku kommunurnar er ógvuliga ójavnt, og partvís tí ábyrgdarbýtið í sambandi við kt-trygd og persónsdatavernd í fólkaskúlanum er ógreitt í løtuni. Ein nevnd umboðandi Uttanríkis- og mentamálaráðið, kommunurnar og aðrar áhugapartar greinar hetta nærri í løtuni.

Í tíðarskeiðinum 2021-25, koma fleiri skipanir, sum í dag eru í rakstri, at vera sløktar. Hesar útreiðslur liggja í dag á ymiskum útbúgvingarstovnum. Tá nýggja skipanin verður sett í verk, verða hesar útreiðslur, og framhaldandi rakstur av nýggju skipanini, savnaðar á einum stað.

Broytingin frá, at hvør rekur kt-økið fyri seg, til at umleggja til felagsloysnir, krevur neyðugar avtalur, millum landsstovnar, kommunur, yrkisfeløg, skúlar, útbúgvingarstovnar og veitarar. Henda tilgongdin er byrjað.

Vinalig heilsan

Hjalmar Hansen
stjóri